

# FAKTA

**Navn:** Anna Elinborgardóttir Berg
**Aldur:** 24 ár
**Úr:** Havn
**Búsitandi:** Keypmannahavn
**Starv:** Lærir til fangavørð á Vestre Fængsel í Keypmannahavn á triðja og seinasta ári.
**Besta við starvinum:** Tað er ein stór avbjóðing bæði at hugsa um tamarhald og trygd, og samstundis at hava ein motiverandi leiklut mótvegis fangunum. Hóast vit hava fastar rutinur, so veit eg aldri, hvat arbeiðsdagurin bjóðar. Og eg havi sera góðar starvsfelagar.
**Ringasta við starvinum:** Tað er sera torført at finna javnvágina millum tað bleyta og tað harða. Eg eri jú eitt menniskja og eg fái samkenslu við summum av fangunum. Men eg má ikki gera mismun og allir fangar skulu viðfarast eins, óansæð hvussu støðan er.

*Anna Elinborgardóttir Berg uttanfyri høgu fongsulsmúrarnar við eyðkendu inngongina til Vestre Fængsel. – Eg gleði meg at sleppa til arbeiðis hvønn dag, tí hóast alt er skemalagt, so veist tú aldri, hvat dagurin bjóðar, sigur hon*

**MYND:** EYDNA SKAALE